

natúrliga menniskja er kallur, og tískil eru tey, ið ikki eru av kallkyni, frávik.

Lat meg geva nøkur dømi: um ein skúlanæmingur ætlar sær at skriva setningin: konan er vøkur og ikki veit hvussu vøkur stavast, nyttar einki at fara at leita í einari orðabók, tí orðið vøkur stendur ikki í har sum leitorð. Í orðabókum er leitorðið fyri lýsingarorð í kallkyni, og tí mást tú duga at benda orðið, tú ætlar at brúka, til kallkynsform. Eftir mínum tykki fullkomiliga óhoyrt, men als ikki ónatúrligt í høvdunum á teimum sum gera orðabøkur, tí hetta er siðvenja/reglan.

Ella orðið verkur: í orðabókini verður hetta lýst sum tað at hava ilt, pína, og dømi er: eg havi sovorðnan verk í høvdinum, sjálvt um eg aldrin havi hoyrt nakran við timburmonnum ella hvat tað skal vera, talað um høvuðverk, men heldur um høvuðpínu, longur niðri verður lagt eitt annað orð aftrat, men tað verður ikki lagt út sum leitorð, t.e. orðið verkir, sum verður sagt at vera pína, stutt áðrenn hon eigur. Hatta við stutt áðrenn, er nú sum man tekur tað, tað veldst um so mangt, sum heldur ikki stendur í orðabókum.

## Føroyskt er fremmant

Seinastu 30-40 árini hava serliga feministar granskað og kjakast um týdningin av máli kontra hugburði. Tað hevur hildið verið týdningarmikið at broyta málið og bent tað inn á eina kynsneutrala leið. Men at eyðmerkja og umskapa reglar, sum stýra atburði/hugburði er torført, serliga tí at amboðini, tú skalt nýta eru grundað á patriarkalska skipan, har maðurin er normurin, ella sagt við øðrum orðum: málið tú ætlar at broyta, eru partur av patriarkalsku skipanini.

Í Føroyum er einasta, eg veit um, sum hevur granskað og skrivað um mál: Kirsten Didriksen. Í Bókini Færøerne Sprog og køn (1986) leggur hon ikki fingrarnar ímillum í niðurstøðu sínari um støðuna hjá føroyskum konum lýst gjøgnum mál og málbrúk.

1. Konur verða ósjónliggjørdar í fjølmiðlum og vera málsliga diskrimineraðar, tær hava ikki eitt mál, tær kunnu identifisera seg við, tað verður í stóran mun tosað í maskulinum um alt, sum fyriferst í samfelagnum, so konur eru útihýstar bæði visuelt og á málsligum plani í miðlunum.
2. Politisku flokkarnir prioritera konur ógvuliga lágt, tær eru góðar at hava við, tað er kanska politiskt korrekt, men tær eru ikki neyðugar og í summum førum beinleiðis skaðiligar, tí tær kunnu ikki savna atkvøður til flokkin, og í summum førum verða tær hildnar bara at spjaða atkvøðurnar ov nógv.
3. Málnevndin er konservativ, hon hevur altíð sæð spurningin um kynsdiskriminatsjón í málinum sum ein stríðsspurning og vísir á, at forkláringin hevur eina málsøguliga orsøk, sum krevur eitt innlit, sum mong/mangar ikki hava. Hetta hava mangar konur sannað, tá ið tær hava fingið slongt í høvdið, at maður merkir menniskja og tað heldur tað fram at merkja so leingi vit góðtaka tað.

## Kynsblinda samfelagið

Nýggjar norskar kanningar hava víst, at sjálvt um konur eru rættiliga aktivar í politikki og samfelagslívi sum heild, so eru tær nógv ósjónligari í miðlunum enn menn, tær vera sera sjáldan brúktar sum dømi, t.d. í lærubókum, uppgávum o.s.fr. Tað kann Elisabeth Møller Jensen, sum er stødd í Føroyum í løtuni, eisini skrivað undir uppá. Dømi, eg komi at hugsa um, er, tá ið stjórin fyri Statens Museum for Kunst fór frá nú í februar og gjørdist stjóri á Nasjionalmuseet í Oslo. Longu dagin eftir kundi Jyllands Posten vísa á níggju møguligar kandidatar til starvið, og ongin var kona. Elisabeth Møller Jensen kallar tað at vera kynsblindur og reksar í aftursvari til Jyllands Posten upp níggju aðrar kandidatar, sum allar eru konur.

Eg haldi eg gloymdi at siga, at stjórin, sum fór í annað starv, var kona.

## Kynsómarkað starvsheiti

Málfrøðingar hava broytt støðu um mál og kyn, eisini í Føroyum. Í des. 1998 segði Málnevndin í einum Orðafari hvat hennara sjónarmið vóru um mál og kyn.

Sagt verður at málið er ikki bert eitt samskiftisamboð, men gjøgnum málið kunnu vit eisini vísa nøkur virði, kenslur og hugburð til tað, sum tosað verður um. Men kjarnin í kjakinum um málið í javnstøðuhøpi snýr seg um ikki at gera mismun millum kynini ella ikki lata nakran vera fyri vanbýti av málsligum orsøkum.

Um trupulleikan við starvsheitum sigur Málnevndin: Mælt verður til at nýta kynsómarkað starvsheiti sum t.d. lærari, fulltrúi, skrivari, leiðari, politistur, sjúkrahjálpari. Men vit hava verri enn so altíð kynsómarkað orð, t.d.: sýslumaður, løgmaður, ljósmóðir, jarðarmóðir. Men vilja vit partú vísa á, at talan er um kvinnu ella mann, ber til at nýta bæði -kvinna/kona og -maður alt eftir lívkyni: tingkvinna/kona, tingmaður; landsstýriskvinna/kona, landsstýrismaður, forkvinna/kona, formaður, talskvinna, talsmaður o.s.fr. Til ber í summum førum at nýta -fólk ella manning sum kynsómarkaða orðing: arbeiðsfólk, embætisfólk, landsstýrisfólk, tingfólk.

Hetta helt eg, góðtrúgvin sum eg eri, at Stjórnarskipanarnevndin fór at taka til eftirtektar, men so var als ikki.

## Menn og aftur menn

Stjórnarskipanarnevndin hevur kjakast og viðgjørt ymisku heitini, ið brúkast skulu í slíkari lóg; Men um tú livir í tí fávitskutu trúgv, at tað vóru orðini tingmaður og landstýrismaður kjakast var um, so fert tú púra skeiv. Í staðin varð kjakast um, um landstýri, løgmaður og landstýrismenn heldur skuldu itið: stjórn, forsætisráðharri og ráðharrar. So tað tykist als ikki sum, at tað er komin nøkrum til hugs í heila tikið bara at taka til umrøðu tann veruleika, at av teimum 16 ymisku heitunum, umrødd í nýggju stjórnarskipanini eru 15 kallkynsheiti og eitt hvørkikynsheiti:

Heitini eru: løgmaður, varaløgmaður, tingformaður, tingmaður, landsstýrismaður, landssakførari, dómari, dómaraforseti, løgtingsgrannskoðari, landsgrannskoðari, umboðsmaður, uttanríkispolitiskur leiðari, uttanríkispolitiskursamskipari, fúti, fakdómari og løgrættufólk.

Í hinum norðurlendsku tingunum er tað bara Ísland, sum hevur kallkynsheiti við manni, har eita tingfólk: tingmenn, og tey í stjórnini eita ráðharrar.

Í Danmark, Noreg og Svøríki eita tey: medlem, repræsentant og ledamot og í stjórnunum eita tey ministøari og statsráð. So tað ber til! Um viljin er til staðar!

## Vísið dirvi og vilja.

Í fyrsta parti undir viðmerkingum um Fólkið og landið, skrivar Stjórnarskipanarnevndin: Føroyar eru millum heimsins elstu lond. Føroyska tjóðin hevur ment seg frá tí degi, norrønir landnámsmenn høvdu við sær stjórnarligar siðir úr Norðanlondum eins og bretsku oyggjunum og skipaðu seg við tingi, løgrætti, vártingum og helst eisini útinnandi og fyriskipandi høvdingum.

Har vóru teir aftur landnámsmenninir, hóast tað munnu vera nøkur ár eftirhondini, at teir komu til landið!

Í apríl í ár vóru 91 ár síðan allir menn fingu valrætt og valbæri í Føroyum. Nú meini eg altso bæði teir við x og y kromosomum og ognum og teir við bara x kromosomum og við ongum ognum.

Ein partur av tí at rudda slóð fyri konum á tingi er at skapa okkum eitt mál, sum gevur rúm fyri konum, og tað ber til!

Eg eri ikki av tí áskoðan, at fólk skulu revsast fyri at kalla konur grussur og formenn og syngja av hjartans lyst saman við Higgins professara: Why can´t a woman be more like a man, men vit eiga at krevja, at tað frá almennari síðu, á tingi, í fjølmiðlum og í lærubókum, verður givist við at kalla okkum menn, og har átti fólkini, ið smíðað hava uppskot til stjórnarskipan Føroya, at víst størri dirvi og vilja.

--

**Keldur:**

Kirsten Didriksen: Færøerne Sprog og køn. Husets Forlag 1986
Kirsten Didriksen: Glottar úr kvinnulívi. Egið forlag 1988
Føroysk orðabók A-Ø. Føroya fróðskaparfelag 1998
Marna Jacobsen: Signalvirði, ella spillir navnið ongan? Dimmalætting nr. 21. 30 januar 2007
Malan Marnersdóttir: Kvinnuroddir. Kvinnur í almenna kjakinum 1890-1902. Mentunargrunnur studentafelagsins 1985
Orðafar nr. 48, desember 1998. 12 árgangur
Dale Spender: Man made language. Routledge & Kegan Paul 1980
Álit. Stjórnarskipan Føroya. Stjórnarskipanarnevndin 18. desember 2006
Stjórnarskipan Føroya. Uppskot. Stjórnarskipanarnevndin 2006
Toril Swan: Kjønn, språk og ideologi. Språknytt 4/1997